

*Niels Monberg skuldi havt eina bjarta framtíð, men so skuldi ikki verða*



*Hans í Beiti í Sørvági fekk vinmannin Niels Monberg at skaffa beiggja sínum kjans við Sally. Hetta skuldi verið gott, men…………*

vinin. Henda bók er framvegis í húsinum.

## Skipari og meistari noktaðu at fara við til Føroya

Tað kom meira og meira fram í bløðunum. Millum annað kom fram, at eftir sera ringu reisuna frá Danzig til Keypmannahavn, noktaðu skipari og meistari at sigla við skipinum til Føroya. Sagt varð:

Kaptajnen brugte meget drastiske Udtryk. Han erklærede rent ud, at "det vilde være Mord at sejle Skibet til Færøerne." Han blev derefter sammen med Maskinmesteren afskediget, og der blev antaget nye Folk.

Skibet blev underkastet en Hovedreparation og derefter godkent af Skibstilsynet. Den afskedigede Kaptajn udtalte, at dette Tilsyn antagelig var fuldstændigt korrekt og rigtigt, men man burde lytte til Erfaringerne fra de Mennesker, der sejlede med Skibet.

Sally havde ogsaa været underkastet et Tilsyn, før det forlod Danzig og bestaaet Prøverne, men da Skibet kom ud i rum Sø, viste det sig, at Naglerne arbejdede sig løse.

## Reiðaríið: Skipið var í lagi

Reiðaríið var sjálvsagt órógvað av allari hesi skrivingini. Teir noktað fyri, at skipari og meistari vóru avkoyrdir, orsakað av, at teir ikki vildu sigla skipið til Føroyar. Teir sendu eisini út fráboðan um, at skipið var kannað úr enda í annan. Skipasýnið váttaði somuleiðis, at alt var í lagi.

Um umrødda brævi frá einum av manningini segði stjórin á skipasýninum Grue, at hann ikki kendi mannin og hansara førleika at meta um hetta.

Eisini verður upplýst, at Sally var minsti sandbátur í Danmark. Annars var tað fyrr hent, at ein líknandi sandbátur var koppaður og fýra mans doyðu.

Síðan verður sagt:

Social Demokraten modtog i Aftes en henvendelse fra en af Sallys tidligere Kaptajner. Han ønskede som Sømand og Skibsfører at takke Bladet, fordi det havde fremdraget den uhyggelige Baggrund for Skibets sidste Rejse.

Det er den tredje Kaptajn, der melder sig og slutter op om kritikken. Han havde været Fører, da Sally tilhørte Højgaard & Schultz. Firmaet havde dengang stillet sig overordentligt velvilligt over for de Krav, han stillede for at gøre Sally sødygtig. Men alligevel gik det galt en Morgen, da han i Storm blev beordret ud af Havnen. Han vidste, at det ville være Galmandsværk at sejle skibet i en Storm, og han gav Mandskabet Ordre til at sætte Redningsbaaden ud og tage den paa Slæb. Hele Mandskabet forsynede sig med Redningsbælter.

Tá ið teir komu út um koppaði Sally, og tað var nærum eitt undur, at eingin skaði hendi.

Hesin skiparin segði, at skipið var so vánaligt, at tað var ikki ráðiligt at fara meira enn 3-400 metur frá landi við tí.



*Foreldrini hjá Eigil Gaarslev. Pápin hevði fleiri ferðir siglt kring heimin við seglskipum*




***Knud Rasmussen***
***Mindeudgave***
***Udgivet af Peter Freuchen - Therkel Mathhiassen***
***Kaj Birket Smith***

-----

***Hans K Olsen***

***Til minde om hans Ven***
***Civilingeniør Niels Monberg***

***f.d. 13/9 1913 i København***
***d.d. 22/5 1939 v. Færøerne.***
***Værket har tilhørt Niels.***
***Venlig hilsen fra hans Fader***
***Gustav Monberg***
:

*Hesa bókina við innskrift fekk Hans í Beiti til áminningar um Niels frá pápa hansara Gustav*

## Um Eigil Olsen Gaarslev

Eigil gjørdist 39 ár. Hann var giftur og fekk tveir synir. Kenneth varð føddur 28. August 1935 og beiggi hansara William var føddur 7. August 1933.

Eigil og konan fóru frá hvørjum øðrum 1-2 ár, áðrenn hann gekk burtur.

Eigil var ein royndur sjómaður. Hann sigldi frá tí, hann var 14-15 ára gamal. Hann sigldi við fullriggarum, og árini 1923-30 sigldi hann sum skipari, stýrimaður og bátsmaður við amerikanskum skipum, m.a. við stuttleikaførum hjá ríkfólki.

Hann fekk ummæli við sær, tá ið hann fór av, og tey geva honum øll tey bestu skoðsmál.

Hann hevur heldur ikki verið bangin fyri at siga sína meining. Hetta sæst millum annað í brævinum, sum han sendi heim. Tað er eisini komið fram, at hann vegna manningina mælti til at venda aftur hendan lagnudagin.

Vit endurprenta sjófrágreiðingina. Tað kann sigast, at hon er nakað kollut. Tað verður bert dentur lagdur á, at lúkan ikki var á. Tað verður eisini sagt, at lastin var ikki full og tí skjeyt hon seg.

Einki verður tó komið inn á standin hjá skipinum. Hetta heldur Kenneth vera sera vánaligt.

Tað kann verða nevnt her, at pápi Eigil var eisini ein royndur sjómaður. Her kann verða endurtikið úr eini frásøgn hjá honum úr einum donskum blaði:

19 Aar gammel havde han været Verden rundt 4 Gange som Skibsdreng. Som Baadsmand og Styrmand har han sejlet med Alverdens Sejlskibe paa Indien, Australien og alle Vegne, hvor der er Vand. I nogle Aar var han Styrmand hos den berømte Kaptajn v. Schirach.

Gaarslev er en af faa Mænd fra den Tid, som har overlevet den gule Feber. Dengang havde de ingen Midler mod Sygdommen, og man regnede med, at kun 1 af 100 stod det igennem. Selv laa han bevidstløs i 17 Dage. Paa Ækvatorkysten laa Skibene Side om Side i Havnen. Besætningerne var Døde alle som en.

De store Skibe, der gik paa Kina med kostbare Ladninger var ofte assureret for 1,5 til 2 millioner Mark, og der var derfor nok af Sørøverdjunker i Farvandene. Man malede Porte paa Skibssiderne, for at de skulde ligne Orlogsskibene, men alligevel blev de overfaldet og udplyndret. Sørøverne sejlede nogle Stykker sammen med lange Tove spændt mellem dem og "fangede" saaledes Skibene. Derefter kastede de Stinkpotter ombord. De var lavet af lakeret Papir, der sprang op, og Duften af Indholdet havde en næsten øjeblikkelig bedøvende Virkning. Der var Slagsmaal paa Liv og Død der udkæmpedes.

**Komandi partur**
Komandi mikudag verður 7. partur um vanlukkuna við Nólsoy og Neptun. Vit hava tá millum annað frásagnit frá Margreth Hvidtfeldt, ættað úr Mykinesi sum misti beiggja við Neptun, og Herborg Danielsen, ættað av Hvítanesi, sum misti pápan við Nólsoy